# in trygd



Í Danmark hava vit eina góða almenna barnaansingarskipan, men upplatingartíðirnar eru ósmidligar og skapa ein stressandi úlvatíma í mongum familjum, sigur Jens Bonke, granskari á Socialforskningsinstituttet.

- Í USA lata karrierufamiljurnar typiskt arbeiðið við heimi og børnum upp í hendurnar á einari mexikanskari húshjálp, sum soleiðis ger gerandisdagin meira smidligan. Tað gevur kvinnunum møguleika at engagera seg í karrieruni, sigur Jens Bonke. Han heldur tó ikki økta nýtslu av tænastugentum vera loysnina.

## Men hvat siga kvinnurnar sjálvar?

Ein au-pair genta kann eisini vera eitt gott hugskot, um hendan skipanin verður brúkt við umhugsni, heldur Jeanette Løgstrup. Hon brúkti sjálv au-pair gentur í nøkur ár, tá børnini vóru smá:

- Hjá okkum var au-pair gentan til stóra hjálp, tá børnini vóru smá, men tað kann vera svárt at lata ov nógv av barnaansingini upp í hendurnar á øðrum. Tað loysir seg at lata praktiskar uppgávur upp til hennara, so sum reingerð, klæðnavask og matgerð. Men man missir lætt sambandið við barnagarðin ella frítíðarskúlan, um tað altíð er onkur annar, sum fylgir børnunum til og frá, sigur Jeanette Løgstrup.

## Filipinskar arbeiðsgentur

Samstundis er talið á tænastugentum vøkstri. Síðst í 90'unum fingu umleið 500 útlendskar au-pair gentur uppihaldsloyvi í Danmark. Seinastu árini er talið vaksið til umleið 1500 um árið. Hesa gongdina hevur Karen Sjørup eisini lagt merki til í sínum grannalagi á Frederiksberg í Keypmannahavn:

- Eg síggi jú í teimum ungu familjunum, at har koma fleiri og fleiri fillipinskar gentur inn, sum skulu hjálpa til í tí ómenniskjaliga dupultkarrierulívinum við trimum samansjóðaðum børnum. Men hóast au-pair modellið skapar meira javnstøðu, hugsi eg ikki, tað er nakað columbusegg. Tað liggur djúpt í danska hugburðinum, at man jú skal ansa sínum børnum sjálvur, ella lata tey til útbúnar pedagogar at ansa.

## Menninir inn á banan

Sambært Jens Bonke skal man heldur finna aðrar loysnir:

- Menninir mugu átaka sær størri part av uppgávunum við børnunum og húsarbeiðinum. Og upplatingartíðirnar á ansingarstovnunum kundu eisini verið meira liðiligar, sigur hann.

Helle Neergaard, lektari í leiðslu á Handilsháskúlanum í Århus, er samd í, at hetta kann vera ein vegur til at fáa fleiri kvinnur í elituna. Men hon heldur eisini, at hugburðsbroyting skal til hjá kvinnunum.

- Tað er ov lætt bara at skjóta alla ábyrgd frá sær. Tað snýr seg eisini um valið hjá kvinnunum. Nógvar kvinnur kvíða fyri at gera karrieru, tí tær ímynda sær, at tað er "kalt á toppinum", og tí tær leiðaratypurnar, tær síggja fyri sær, eru menn, sum tær ikki kenna seg aftur í, sigur hon.

## Kvinnurnar eru harðar

Sambært Helle Neergaard verður tvístøðan hjá kvinnum ikki lættari av, at nógvar kvinnur praktisera ein form fyri sjálvjustitis og bólkatrýst. Tað hevur hon sjálv upplivað, tá hon fyri nøkrum árum síðan valdi at fara 6 mánaðir í barsilsfarloyvi. Fleiri kvinnur vóru firtnar inn á hana og spurdu, hví í allari verðini hon ikki tók foreldrafarloyvi.

Her bleiv eg sum karrierukvinna stemplað sum ein vánalig mamma, og nettupp hetta stemplið heldur nógvum kvinnum aftur, sigur Helle Neergaard.

## Menninir taka kjansin

Útgreiningar vísa, at elitan í dag er býtt í tvey segment, sum hava ymiskar karrieruvegir og mentanareyðkenni. Kvinnurnar eru serliga í "útbúgvingarelituni", har vegurin til eitt vællønt starv gongur gjøgnum eina langa útbúgving. Her telja tær 25%.

Harafturímóti eru bara 13% kvinnur í hinum segmentinum – millum sokallaðu entreprenørarnar, sum hava vællønt størv uttan at hava serliga langa útbúgving. Tað eru sostatt mest menn, sum byrja eitt virki og fáa succes, ella arbeiða seg upp gjøgnum hierarkiið uttan at veittra við einum fínum prógvi.

Hetta seinra kemur ikki dátt við hjá Helle Neergaard, sum hevur granskað í kynsmunum á íverksetaraøkinum:

- At kvinnur fylla so lítið í entreprenørheiminum hevur nakað at gera við vinnulívið í Danmark. Her hendir vøksturin í smáu virkjunum, har tekniskur ella fakligur kunnleiki krevst. Tað appellerar nógv til menn og lítið til kvinnur.

## Útbúgving er kortini vegurin

Helle Neergaard undirstrikar, at í framtíðini verða stórir møguleikar í samspælinum millum mannligar og kvinnuligar leiðsluførleikar. So tað er bara um at smoyggja ermarnar upp, so fleiri kvinnuligir entreprenørar fara at síggjast.

Karen Sjørup heldur tó, at kvinnurnar fyrst og fremst skulu satsa uppá at klintra upp í útbúgvingarelituna, um javnstøða skal røkkast:

- Eg viðgangi, at kvinnurnar enn ikki hava funnið koduna til elituna gjøgnum útbúgving. Yvirhøvur ikki. Men eg haldi kortini, at útbúgving er fyrsta og týdningarmesta stigið á veg móti meira javnstøðu í toppinum á samfelagnum, sigur hon.